VIÐMERKINGAR

# Sjálvberandi búskapur í eygsjón

**Jógvan Arge**
*Valevni tjóðveldisfloksins til løgtingsvalið*



Eftir fýra ár við fullveldispolitikki eru Føroyar nógv nærri sjálvberandi búskapi, enn vit nakrantíð hava verið.

50 ár við heimastýri heftu okkum at donskum pengum. Við ríkisveitingini keyptu danir sær makt í Føroyum. Við ríkisstudninginum komu pengar inn í renslið, sum vit ikki sjálvi skaptu virðir fyri.

Tað gjørdi okkum búskaparliga løt og slepti okkum undan at fremja neyðugar effektiviseringar

Á lutfallinum millum tað, sum vit hava brúkt, og tað, sum vit hava framleitt, kann síggjast, hvussu vit blivu alsamt meir heft av donskum pengum.

Í sekstiárunum var innlendska nýtslan 13% størri enn bruttotjóðarúrtøkan, í sjeytiárunum 14% størri og í áttatiárunum 18% størri.

Hendan meirnýtslan varð í stóran mun fíggjað við studningi úr Danmark - og sum fráleið eisini stórum uttanlandslánum. Til endans rapaði allur búskapurin.

Men seinastu árini hevur verið vent í holuni, og í nítiárunum hava vit í meðal frameitt 3% meir enn vit hava brúkt um árið.

Tí hava vit fingið minni arbeiðsloysi, skattalætta, betri undirstøðukervi, hækkaðar játtanir til almennar tænastur, pensjónir og aðrar vælferðarveitingar.

**Búskapurin góður**

Vit hava so at siga heldur ikki brúkt blokkstudningin. Landskassin, kommunurnar, arbeiðsloysistryggingin og aðrir almennir samfelagsstovnar hava havt yvirskot, sum hevur svarað til blokkin. Yvirskotið er farið til at gjalda skuld niður við og at byggja upp gjaldførisgoymslur at taka til, um búskapurin aftur verður fyri bakkasti.

Føroyska samfelagið hevur ikki longur uttanlandsskuld, men eigur pengar til góðar í útlondum. Í 1992 skyldaðu vit 7,9 mia. kr. uttanlands. Fyribils uppgerð fyri árslok 2001 vísur, at vit tá áttu 3 mia kr. meir í útlondum, enn vit skyldaðu útlondum.

Sjálvur landskassin skyldar framvegis danska statskassanum 3,4 mia. kr. Men landskassin eigur eisini ognir sum Føroya Banka, Fiskasøluna og Fiskavirking umframt aðrar grunnar og almennar fyritøkur. Hesar ognir verða mettar í minsta lagi at viga upp ímóti skuldini hjá landskassanum.

Landskassin eigur nógv meira tøkan pening í landsbankanum enn nakrantíð. Seinasta ársfjórðing var gjaldførið í meðal 2300 mió. kr.

**Tað almenna væl fyri**

Landskassin veðheldur heldur ikki nær til so nógv, sum í áttatiárunum. Veðhaldsskyldurnar vóru í 1989 2.000 mió. kr. og koyrdu landskassan um koll. Í dag eru veðhøld landskassans fyri privatum skuldarum einans fyri 7 mió. kr.

Tað almenna er tí sera væl fyri at standa ímóti minking av blokkinum í komandi tíðum.

Tjóðveldisflokkurin hevur umsitið fíggjar- og búskaparmál hetta valskeiðið. Rikin hevur verið ein miðvísur og ábyrgdarfullur politikkur, hvørs endamál hevur verið at gera okkum óheft av donskum studningi samstundis sum sosial trygd og íløgur í framtíðina hava verið raðfestar hægst.

Tjóðveldisflokkurin er til reiðar at halda kósina fram móti einum sjálvstøðugum og sjálvberandi Føroyum.

Sjálvberandi búskapur er fyritreyt fyri einum betri Føroyum og veruligari vælferð í egnum landi.

# Neyðugt at brúka av bókini

**Sune Jacobsen**
*Valevni Sambandsfloksins í Vágum*



Tá vit vóru við valborðini fyri fýra árum síðani, var ein sløk mia. í landsbankanum. Í dag, fýra ár seinni, eru 2.5 mia. kr. í landsbankanum. Vøksturin er sostatt 1.5 mia. kr. Sitandi samgonga hevur í einum fýra ára skeiði fingið sendandi 4 mia.kr. úr Danmark. Tá vøksturin í landsbankanum er 1.5 mia.kr., og vit hava fingið sendandi 4 mia. kr., so hevur sitandi fullveldissamgonga brúkt 2.5 mia. kr. av blokkinum, og ikki sett hann á bók, sum varaløgmaður plagar at póstanda.

Tann samgongan, sum tekur við eftir valið í apríl, fær ikki sendandi 4 mia.kr í einum fýra ára skeiði. Í mesta lagi, og tað er treytað av, at veljarin ikki gevur Tjóðveldis- og Fólkaflokkinum meirilutan við valið, fáa vit sendani 2.5 mia kr. Um hetta var hent, at niðurskurðurin var framdur í 1998, so hevði ongin króna verið løgd til síðis í hesum valskeiðnum, sum endar síðst í næsta mánaða.

Sitandi samgonga hevur lagt eina fíggjarlóg fram, sum hevur eitt stórt hall. Hvussu stórt vita vit ikki nágreinliga enn. Men eingi tekin eru í sól og mána um, at inntøkurnar fara at halda.

Samstundis fara vit sum valevni út, og siga, at útreiðslurnar á fíggjarlógini skulu hækka. Hvussu skulu vit fáa pláss fyri øktum útreiðslum? Onkur vil siga, at tað eru bara tríggir møguleikar:

- Rationaliseringar
- Hægri skatt
- Øktan útflutning

Til rationaliseringar er at siga, at har er neyvan tað stóra at heinta. Allar samgongur hava havt hetta í samgonguskjølum, at almenna umsitingin skal rationaliserast og effektiviserast, men har hevur lítið verið at heinta. Tað kunnu vit bara konstatera. Hægri skattur kemur ikki upp á tal við Sambandsflokkinum í samgongu og at økja um útflutningi er ikki nakað, sum verður gjørt í einari handavend. Politikarar kunnu skapa karmar fyri vinnulívinum, men marknaðarprísirnar kunnu teir einki gera við. Hvørji ráð eru so til at taka?

Vit, sum bjóða okkum fram, eiga at vera erlig yvir fyri veljaranum. Eingin onnur loysn er at fíggja ábøtur á samfelagið, enn at brúka av tí yvirskotslikviditeti, sum er í landsbankanum. Tað eru, sum áður nevnt 2.5 mia.kr. í landsbankanum. Lógin um landsbankan sigur, at har skulu vera 1.5 mia. kr., so her er ein reservi upp á 1 mia.kr. Vit byrja, sum tað nú sær út, upp á tey raku árini, og hava rætt at brúka av tí, sum lagt er í løðurnar tey góðu árini.

Til alla lukku eydnaðist tað ikki fullveldissamgonguni at stovnseta búskapargrunnin. Høvdu teir havt megnað tað, so var eingin yvirskotslikviditetur, tí avlopið skuldi brúkast at fíggja loysingina við.

# PASS!!

**Bill Justinussen**
*Valevni Miðfloksins*



**Neyðars Palleba**

Góði Palleba! Eg taki so hjartaliga synd í tær. Tí hvønn skalt tú velja av øllum hesum, sum vilja selja alt, sál, æru og hugsjónir fyri at sannføra teg um, at júst har er krossurin best farin tann 30. apríl. Eg havi eisini roynt at blandað meg, men nú meldi eg pass. Mínar hugsjónir eru tað einasta, eg kann bjóða tær, góði Palleba, nú gyltu lyftini um tunnlar, skattalættar, meiri almennan pening, ansingarpláss til so at siga øll sum hvirluvindar fúka um oyru og eygu gjøgnum luftbornar og handbornar fjølmiðlar. Tó vil eg staðiliga ávara teg, um tú velur øll hesi, sum lova meir, enn tey klára at halda: gyldið skalt tú gjalda!!

**Hugsjónarloysi**

Góði Palleba! Mong koma til tín bæði í gamni og álvara, bæði tá gildisskálarnir fyllast, og tá tú í sorg fylgir onkrum av tínum næstu til seinasta hvíldarstaðið. Ósmæðin geva tey tær sína hond og royna at siga tær, at tey hugsa um teg. Royna at taka seg væl út í eygunum á tær, royna at tekkjast, so tú umsíður skalt ásanna, at hasin skal hava krossin tann 30. apríl. Har má eg aftur melda pass. Eg fái ringan smakk í munnin og rodni, tí har kann eg als ikki vera við. Orsaka, Palleba!

Tað er ikki fyri hugsjónirnar, at tey vilja verða vald. Hvør aftan á annan trína tey fram og bjóða sína vøru. Og tað eru lágprísvørur, tú skalt keypa, Palleba! "Keyp frá mær", rópa tey, "eg havi besta tilboðið". Onkur sigur enntá, at "títt ynski er mítt mál!!" Kann tað sigast greiðari? Onkur annar sigur, at tú kanst vera fullkomiliga tryggur, um tú velur hann! Uppaftur onkur sigur, at uttan hann koma vit neyvan livandi gjøgnum morgindagin. Hetta eru jú heilt fantastiskar útsøgnir, sum tú Palleba skalt taka støðu til.

**Pass**

Men her má eg aftur melda pass, góði Palleba. Eg havi bara mínar hugsjónir at bjóða tær. Og eg eri so býttisliga erligur at siga tær, at um tú ikki tekur undir við mínum hugsjónum, vil eg als ikki hava tína atkvøðu. Tí eg klári á ongan hátt at liva upp til annað, enn tað, eg sjálvur trúgvi uppá. Eg klári undir ongum umstøðum at gera tíni ynski til mítt mál. Vilt tú hava slík fólk inn, sum hvørki hava rygg ella herðar, mást tú velja tey. Vilt tú hava fólk inn, sum tú kanst mala um tín lítlafingur, so mást tú velja tey.

Góði Palleba! Ígjøgnum seinastu árini havi eg við ávísum millumbilum roynt at vísa tær á mínar hugsjónir. Tær eru bygdar á klettagrund, tí tori eg at bera tær fram. Um tú tekur undir við teimum, gevi eg tær bert eitt lyfti: eg standi inni fyri tí, sum eg trúgvi á og sum eg meti vera til gagn fyri land og fólk.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg



VIÐMERKINGAR

# Um útoyggjapolitik

**Sólvit Simonsen**



Nú útoyggjanevndin er farin til verka, fari eg at royna at leggja meg eitt sindur uppí við hesari skriving. Av góðum grundum verður tað Skúoyggin, eg fari at halda meg til, við tað at har føli eg meg tryggast.

Sum eg skilji á teimum, sum fáast við hettar verk, so dúa tey mest uppá tað, sum er. Hví ikki royna nakað nýtt? Hevði tað ikki verið betur at roynt at stuðla við einum arbeiðsplássi í bygdini? Tað átti at verið eitt ella annað, sum nemt var at føra út á oynna, eg meini við onkra lætta rávøru, so man kundi byrja við nøkrum fáum arbeiðsplássum. Tað vísir seg, sum teir eru so grammir at fáa so nógvar túrar við rutuni sigldar hvønn dagin. Hettar vænti eg ikki kemur at redda nakra situatión, uttan í hásesong um summari til ferðafólk. Fyri at sigla nógv, má man eisini hava nakað at sigla við, og tað vita bæði skúoyingar og onnur, sum fáast við siglingina, at tú mást lata tær noyða við ein túr um dagin eftir sjóvarfalli.

Somuleiðis hevur verið tosað um at fáa uttanbíggja jørðina aftur til tey, sum búgva í Skúgvi. Eg haldi at skúoyingar hava brúk fyri hesum dúligu monnum, sum ferðast dúliga ímillum, og eru av raskastu monnum at røkja bæði seyð, bakka o.a. Fleiri av hesum monnum eru fluttir aftur til Skúoyar, og tað høvdu teir neyvan gjørt, um ikki ognirnar hjá teimum hoyrdu teimum til.

Í Skúgvi verða slaktaðir einir 600 seyðir. Hetta kann ikki geva vinnu til nógvar familjur. Eg rokni ikki við, at man kann roknað við stórt meir enn kr. 500,– pr. slaktaðan seyð, og verður tað ikki meir enn einar kr. 300.000,– netto. So tað verður ikki tað stóra til allar skúoyingar.

Fyri trivnaðin í oynni meti eg, at tað er ógviliga neyðugt við einum bygdahúsið, so fólkið kundi komið saman til ymiskar hugnaløtur. Eitt bygdahús við einum køki, einum passandi sali og onkrum goymslurúmi. Hettar kundi fingist upp fyri ikki so nógvar pengar, og høvdu skúoyingar eisini verðið nógv betur fyri at tikið ímóti ferðafólkið um summarið.

Øll tey ár, eg havi siglt uppá Skúoynna, hevur fólkatalið í kommununi ligið um 90 fólk. Og taka vit so eina bygd sum Dalur, sum liggur um eini 50 fólk, so hava teir eitt sera gott bygdahús, sum er til stórt gagn fyri bygdina.

Í Skúgvi eru í dag 16 børn í skúlaaldri og undir skúlaaldur. Sum fyrr sagt, so meti eg tað vera av stórum týdningi at fara undir eitt arbeiðspláss, so tit ikki missa øll hesi børn av bygdini, táið tey koma uppí arbeiðsár.

Eg fari til stuttleikar at nevna, at táið handan daman úr Klaksvík, sum eg ikki ivist í er eitt skilafólk, bleiv sett sum leiðari fyri útoyggjapolitikkin, kundi eg ikki lata vera við at hugsa, hvat teir gomlu skúoyingarnir, sum eg minnist teir – teir komu inn til Sands at avreiða fiskin, tað sást ikki inn í eyguni á teimum fyri sjósalti – hvat mundu teir sagt, um ein vælístandgjørd dáma norðan úr Klaksvík kom og segði teimum, hvussu teir skuldu lívbjarga sær?

# Útpurring

**Ólavur Rasmussen**



Í 1816 varð Føroya løgting niðurlagt eftir harraboðum úr Keypmannahavn. Eftir einum degi varð alt føroyska embætisverkið sostatt avhøvdað. Í 1852 varð løgtingið endurreist sum "rådgivende organ", t.v.s sum eitt eiti. Og í dag, vit skriva 2002, eru tað framvegis oddafiskar í donsku flokkunum í Føroyum, javnaðarflokkinum og sambandflokkinum, sum ikki unna føroyingum eitt løgting við suverenum myndugleika. Og tað verður ikki spart uppá krútið til tess at sáða mistreysti niður í fólk: vit orka einki, megna einki, eru einki. Tit fabla um neyð og armóð, sum stendur í durinum um vit taka ábyrgd av egnum landi og viðurskiftum. Tit fabla um, at einki stig má takast uttan fullkomnna vissu fyri tí, ið hendir í framtíðini.

Hava tit gloymt hvør bygdi hetta landið? Hava tit gloymt, at tað vóru naknar hendur, sum við deyðsiglara óræddir brutu sjógv fyri at leggja lunnar undir framburð og menning av landi okkara? Hava tit gloymt, at okkara gomlu kvinnur og menn ikki løgdust hendur í favn, men órædd stríddust millum møguleika og ómøguleika fyri at gera tað møguligt hjá komandi ættarliðum at hava tað gott?

Okkara gomlu lótu ikki óvissuna forða fyri egnum lívsfýsni og áræði. Og tað er teimum fyri at takka, at vit eru komin so langt, sum vit eru - eitt av heimsins mest framkomnu samfeløgum. Vit kunnu siga hvat vit vilja, men hesar kvinnur og hesir menn hava lagt lunnar undir okkara samfelag, uttan nakað forkelað krav um ómøguliga vissu. Hvørt sjúkrahús, hvør skúlabygningur, hvør einasti seymur, sum er brúktur at byggja við her á landi, hvør einasta útbúgving í Føroyum og vit kundu hildið á at ramsa upp: Alt hetta er borið av teimum sterku, naknu hondum, sum hava stríðst á havinum og uppi á landi.

Og hvat siga donsku flokkarnir í Føroyum við ungdómin í dag: gangið ikki, men grulvið! Havið ikki áræði, men latið óttan stýra tykkara lívsleið. Spyrjið ikki, hvat eg kann gera fyri mítt land, men spyrjið, hvat danska fólkið kann geva tykkum í olmussu. Havið ongar visiónir, men latið afturhaldnið verða hægsta principp í tykkara lívi. Takið ikki ábyrgd av egnum landi, men grátið eftir donskum blokki!

Vit skriva 2002. Tíðin er komin til útpurring. Tjóðin skal endurreisast, og løgtingið eigur at fáa evsta vald í egnum landi. Soleiðis sýna vit ungdóminum álit og teimum gomlu, røsku, naknu hondunum, sum bygdu land, virðing og tøkk.

# Nú skulu bíðilistarnir á sjúkrahúsinum burtur

**Eyðólv Dimon**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



At bíðilistarnir til eina skurðviðger á føroyskum sjúkrahúsi ofta eru fleiri mánaðir vóru helst fá, sum góvu gætur, fyrr enn heilsumálaráðharrin frá tingsins røðarapalli segði frá hvussu út av lagi støðan er. Tað kann als ikki góðtakast, at fólk skulu bíða fleiri mánaðir eftir at sleppa til skurðviðger. Javnaðarflokkurin hevur tí sett sær sum eitt av sínum høvuðsmálum eftir valið, at fáa bíðilistarnir burtur. Nógvar orsøkir eru til bíðilistarnir, eitt nú, at deildir á Landssjúkra-húsinum eru stongdar partar av árinum. Hetta kann loysast við at hækka játtanina til Landssjúkrahúsið, og tí vil Javnaðarflokkurin tryggja sjúkrahúsverkinum neyðugu játtanina, so deildir á Landssjúkrahúsinum ikki verða afturlatnar.

**160 røktarheimspláss fara eisini at minka bíðilistan**

Ein onnur orsøk er, at fullveldis samgongan ongi nýggj røktarheimspláss hevur útvegað. Fylgjurnar hava verið, at fólk sum áttu at verið á røktarheimi, ikki kunnu útskrivast, og sengur, sum skuldu verið brúktar til sjúklingar, eru upptiknar av fólki, sum ikki eru innløgd til sjúkraviðgerð, men sum ikki kunnu útskrivast, tí ongi røktarheimspláss eru. Javnaðarflokkurin setir sær fyri í komandi valskeiði at útvega 160 ellis- og røktarheimspláss.

**Primera heilsutænastan og uppvenjingin styrkjast**

Vit skulu styrkja uppvenjingina eftir sjúkratilburð, samstundis sum vit skulu taka ítøkilig stig at betra fólkaheilsuna við t.d. at skapa arbeiðsumstøður soleiðis, at fyrilit verða tikin fyri hesum. Farast má eisini undir miðvísa ætlan um regluligar fyribyrgjandi heilsukanningar fyri øll. Á tannaheilsuøkinum hava vit veruliga gjørt nakað við hetta, men nú er tíðin komin til at hetta verður víðkað.

**Vallyfti fyri 116 millíónir**

Sambært útrokningum hjá Javnaðarflokkinum, so økjast útreiðslurnar hjá landskassanum við 194 millíónum krónum av vallyftunum hjá Javnaðarflokkinum. Men av tí at skattainntøkur landskassans eisini økjast av hesum, verður nettoútreiðslan "bara" 116 millíónir krónur. Spurningarnir eru tí: Hvussu ber tað til, at føroyska samfelagið, sum farna valskeið hevur havt fleiri hundrað millíónir kr. í yvirskoti, ikki hevur ráð til eitt vælvirkandi Landssjúkrahús. Hvussu ber tað til, at tað skal vera neyðugt á hvørjum ári at niðurberja Landssjúkrahúsið, soleiðis at allir føroyingar verða taparar ? Svarið er einfalt, raðfestingin hjá fullveldis samgonguni.

# Fólkaflokkurin, tann trygga loysnin til sjálvstýrið

**Annika Olsen**
*Cand.mag., valevni fólkafloksins í Suðurstreymi*



Æran er eyðkenni fyri tann gamla føroyska siðaarvin. Føroyingar hava altíð sett æruna høgt - "æran var teirra mið". Henda æra hevur snúð seg um at kunna vera frælsur, sjálvstøðugur og hava føtur undir egið borð. Hesin kampur fyri æru og sjálvstøðu speglast aftur í sjálvstýristilgongdini, nevnliga at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Tað er ongin ivi um, hvar Fólkaflokkurin stendur i hesi sjálvstýristilgongd. Fólkaflokkurin hevur eina greiða, stabila og trygga sjálvstýristilgongd, har málsøkini verða yvirtikin eftir avtalu og so hvørt føroyingar eru fíggjarliga og umsitingarliga til reiðar til tess. Aftaná at øll málsøki eru yvirtikin, og allar fíggjarligar bindingar til Danmark eru burtur, kunna Føroya fólk sjálvi á einari fólkaatkvøðu í 2012 taka stig til, um tey vilja hava endaligt sjalvstýri ella ikki. Fólkaflokkurin stendur sostatt fyri einari demokratiskari linju, har tað verður víst stór ábyrgd fyri Føroya fólki, Føroya landi og ikki minst æruni hjá tí einstaka føroyinginum. Fólkaflokkurin ynskir ikki at seta land og fólk út av kós og harvið enda í einari búskaparligari kreppustøðu sum í 80 unum. Men harufturímóti ynskir Fólkaflokkurin at tryggja tí einstaka føroyinginum, at hann og hon framvegis kunnu búleikast í Føroyum aftaná eitt sjálvstýri og ikki noyðast at rýma frá húsi og heimi til eitt nú Danmarkar. Fólkaflokkurin verður ofta kritiseraður fyri at vera ov hovligur i sjálvstýrismálinum, men minnist til orðatakið: Tað, sum kemur lættfer lætt!